

Klokkan eitt sunnunáttina loyptu nakrir hvøllir brestir hvøkk á havnarfólk

# Loyptu ótta á fólk við buldri og braki

**Klokkan eitt sunnunáttina loyptu nøkur øgilig buldur í Havnini hvøkk á fólk. Ttað var Eik Banki, sum helt 175 ára føðingardag**

FÝRVERK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var ikki sørt, at ótti kom á nógv havnarfólk sunnunáttina. Klokkan út ímóti eitt sunnunáttina hoyrdust brádliga nakrir hvallir brestir, sum vóru so harðir, at tað setti í húsum langt burturi og lýsti stóran part av býnum upp. Tað sóust eisini rakettir og annað fýrverk, men serliga buldrini loyptu hvøkk á fólk.

Nógv fólk vórðu ørkymlað og stúrdu fyri, hvat var á vási og tað hoyrdi løgreglan í Havn fyri bæði sunnunáttina og sunnumorgunin, tí fólk hava ringt á støðina at klaga og spyrja, hvat var á vádi

Men støðan var ikki so hættislig kortini, tí tað var bara Eik Banki, sum helt 175 ára føðingardag við veitslu og fýrverki.

Løgreglan visti av, at fýrverkið skuldi vera, men hildið verður kortini, at tað var nakað seint á kvøldi, at tað var skotið, tí klokkan gekk til eitt og hildið verður ikki, at tað er rætt at hava so ógvusligt fýrverk eftir vanliga songartíð.

Marner Jacobsen, stjóri í Eik, hevur onga serliga viðmerking til málið, men hann sigur, at øll loyvi vóru í lagi.

Í sambandi við 175 ára føðingardagin, helt Eik stóra føðingardagsveitslu við 800 gestum, bæði hiðani og uttanlands.

# Fáa forvitnisliga vitjan úr Ísrael

**Í næstu viku fáa ísraelsvinir í Føroyum forvitnisliga vitjan heilt úr Ísrael og í tí sambandi verða fyrilestrar um alt landið**

VITJAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Gro Wenske fer at greiða føroyingum frá um Ísrael, jødar og um støðuna í Ísrael sum heild*

Tað er leiðarin í norðurlendsku sjómannakirkjuni í Haifa, Gro Wenske, sum kemur til Føroya at greiða frá um Ísrael, jødarnar og um støðuna í landinum nú, siga Ísraelsfelagi og felagið, Vinir Ísraels, í tíðindaskrivi í dag.

Gudfrøðingurin, Gro Wenske, er norsk og hevur búð í Ísrael í 40 ár. Hon hevur altíð havt stóran áhuga fyri landinum og fólkinum har. Hon hevur ferðast nógvastaðni kring heimin og hildið fyrilestrar um Ísrael og Miðeystur, siga tey bæði feløgini.

Hon er eisini blaðstjóri á "Israels Røst" sum roynir at greiða frá um Bíbliuna og Ísrael og virkar fyri góðum samskifti millum jødar og kristin.

Gro Wenske fer at halda hesar fyrilestrar kring landið næsta vikuskiftið: Hóskvøldið klokkan 20.00 verður hon í Filadelfia í Gøtu, fríggjakvøldið klokkan 20.00 verður hon í Libanon í Sørvági, leygarkvøldið klokkan 20.00 verður fyrilestur í Ósáskúlanum í Klakvík, sunnudagin klokkan 15.00 verður hon at hoyra í Skúlahøllini í Trongisvági og sama sunnukvøld klokkan 20.00 verður hon í Skúlanum á Trøðni í Havn.

Høvuðsevnini á fyrilestrunum er "Ísrael og Jesus hoyra saman" og "Ísrael í kreppu" og Aftaná fyrilestrarnar verður høvi at seta henni spurningar afturvið einum drekkamunni.

# Løgmaður til Álands at kunna seg um ES-limaskap

**Í dag er Jóannes Eidesgaard, løgmaðr, á almenna vitjan á Álandi. Eitt av endamálinum hjá løgmanni við ferðini er at kunna seg um álendska ES-limaskapin**

ÁLANDSFERÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Áland hevur stórar inntøkur av ferðavinnu, og tað ynskir løgmaður eisini at kunna seg um*

Í dag eru løgmaður Jóannes Eidesgaard og konan Anita á almenna vitjan á Álandi.

Hetta er fyrstu ferð, at Jóannes Eidesgaard vitjar Áland.

Tað er eftir innbjóðing frá álendska starvsfelaga sínum, landtråd Roger Nordlund, sum var í Føroyum í 1998. Hann hevur boðið løgmanni á vitjan.

Á skránni fyri vitjanina er fundur við stjórnina, og heilsað verður upp á løgtingsformannin. Áland er gomul sjóvinnutjóð. Í tí søguliga partinum av vitjanini verður stokkið inn á gólvið í sjóvinnusavninum og savnseglskipinum Pommern, sum er eitt av teimum fáu stórseglskipunum av sínum slag, sum eru varðveitt í heiminum. Harumframt verður vitjað í Kastelholm slotti, sum lutvíst er uppafturbygt og lutvíst er toft. Eisini verður farið út í skergarðin, har løgmaður fer á flot.

Í tí vinnuliga partinum verður vitjað í eini súreplaplantasju, á einum eplavirki, sum ger kips, kunnað verður um ferðavinnu á eini golfmatstovu, og vitjað verður í einum víngarði, sum ger súreplavín.

Áland verður kallað friðaroyggjarnar. Tað er einasta sjálvstýrandi landøki í Europa, sum er hernaðarfrítt og neutralt sambært millumtjóða sáttmála.

Á skránni eru fleiri fundir og vitjanir, men løgmaður ætlar at leggja dent á at frætta um álendska ES-limaskapin. Áland er limur í ES sum partur av finska ríkinum, eins og Føroyar høvdu verið tað sum partur av danska ríkinum, um føroyingar høvdu valt ES-limaskap.

- Eg havi skilt, at tað er ein ávís ónøgd á Álandi um ES-limaskapin, tí landið hevur avgjørt onga ávirkan á tað, sum hendir í ES, sigur Jóannes Eidesgaard.

Áland hevur stórar inntøkur av ferðavinnu, og tað ynskir løgmaður eisini at kunna seg um.

Ferðin hjá løgmanni og frú á Álandi endar mikudagin.